## Fá børn fáa hjálp

Í Grønlandi vísa aknningar, at alt ov fá av teimum børnunum, sum hava verið fyri kynsligum ágangi, fáa ta neyðugu hjálpina. Tí hevur felagsskapurin Bedre Børneliv sett sær fyri at útvega eitt barnahús, sum skal taka sær av børnum, sum hava verið fyri kynsligum ágangi. Kynsligur ágangur ímóti børnum er evnið á einari ráðstevnu, sum er í Nuuk í hesari vikuni. Tøl hjá grønlendsku hagstovuni fyri 2007 vísa, at tað árið vórðu 37 fólk dømd fyri samlegu ella annað kynsligt samband við børn undir 15 ár.



## Obama bað um frið

Amerikanski forsetin, Barack Obama, bað í nátt limirnar í Senatinum og Umboðsmanantinginum gevast við at keglast um uppskot hansara um eina nýskipan á heilsuøkinum. Í røðuni fyri Kongressini segði forsetin, at keglið er merkt av skeivum upplýsingum, sum ørkymla fólk. Hann mælti politikarunum til at arbeiða saman fyri at fáa nýskipanina framda í verki. Uppskotið hjá Obama skal hjálpa teimum 46 milliónum amerikanarunum, sum onga sjúkratrygging hava, samstundis sum uppskotið skal gera amerikanska heilsuverkið bíligari.

# Tavan sló øll met í ár



*Tavan hevur sett met í nøgd í gulllaksavertíðini í summar. Nú verður lagt um til upsaframleiðslu, og í næstu viku er ætlanin, at virkið fer at leggja seg út í kappingina um upsan*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Í vertíðini í ár hevur Tavan í Leirvík tikið ímóti tilsamans 10.770 tonsum av gulllaksi. Hetta er soleiðis nógv tað størsta árið í nøgd, síðan felagið í 1994 fór undir at virka fars úr gulllaksi**

GULLLAKSUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú gulllaksavertíðin í ár nærkast endanum, er greitt, at Tavan í Leirvík hevur tikið ímóti heili 2.520 tonsum meira, enn felagið hevur gjørt nakað annað ár í 15 ára longu søgu felagsins.

Í ár hevur felagið soleiðis keypt tilsamans 10.770 tons av gulllaksi, sum tey umleið seksti fólkini, ið eru knýtt at virkseminum í Leirvík, hava virkað til fars.

Stjórin í Tavuni, Jóan Magnus Rasmussen, sigur, at næst besta árið í nøgd hjá felagnum var í 2002, tá tey keyptu og virkaðu 8.250 tons.

### Upp á stás

- Vertíðin byrjaði tíðliga í ár, og veiðan hjá skipunum hevur verið góð. Vit hava arbeitt við tveimum vaktum, har hvør vaktin hevur verið í sving í 10 tímar, og vit hava eisini arbeitt nógvar leygardagar, síðan vertíðin byrjaði í apríl.

Jóan Magnus sigur, at hóast tonsini í ár eru nógv fleiri enn nakað annað ár, hevur framleiðslan gingið upp á stás, sum hann tekur til.

- Jú, eg haldi, at tað hevur gingið sera væl at fáa fiskin til høldar. Hetta hevur eydnast okkum við røskum og dugnaligum arbeiðsfólki, sum virkuliga hava lagt rygg til, at hetta hevur latið seg gera.

Stjórin sigur, at Tavan hevur eina góða "stammu" av arbeiðsfólki, har nógv hava verið í starvi hjá felagnum í fleiri ár – og onnur eru nýggjari í hesum virksemi.

- Vit hava soleiðis eina góða samanseting av fólki, bæði tilkomnum og ungum, sum hava gjørt tað møguligt hjá okkum at fáa so stórar nøgdir av fiski til høldar, leggur hann aftrat.

### Avtalu um alt

Jóan Magnus Rasmussen sigur, at allur gulllaksurin, sum Tavan hevur keypt í ár, er virkaður til fars, og í minsta lagi 70% av framleiðsluni verður selt til Noregs.

- Vit hava avtalur um levering og sølu av allari framleiðsluni, men seinastu nøgdirnar verða ikki seldar fyrr enn seint í apríl næsta ár, sigur hann.

Eitt sindur ymiskt hevur verið ár undan ári, hvussu leingi Tavan hevur keypt og virkað gulllaks.

Vanliga plagar framleiðslan at vara fram til umleið hálvan august, og soleiðis var bæði í fjør og í ár, men eitt nú í fyrraári keypti virkið gulllaks fram til umleið hálvan september.

Tað er ikki at taka munnin ov fullan at siga, at Tavan er einasta felag í Føroyum, sum veruliga hevur fingið tað at bera til við gulllaksi – og í øllum førum við farsi úr gulllaksi.

Virksemið, sum byrjaði longu í 1994, hevur øll árini givið avlop og í nøkur ár, meðan stórur partur av føroysku fiskavirkisvinnuni lá í andaleypi við stórum reyðum tølum á botnlinjuni, hevði Tavan góð avlop.

Besta árið hjá felagnum í Leirvík var í 2006, tá avlopið var heilar 7,5 miljónir krónur.

Í fjør hevði Tavan eitt avlop upp á 2,7 miljónir krónur.

### Góð gulllaksaveiða

Eins og undanfarin ár, hava aftur í vertíðini í ár verið seks skip á gulllaksaveiði.

Trý av hesum hava burturav lagt veiðina upp til Tavuna í Leirvík. Tey eru Polarhav og Stjørnan, sum partrola og Eysturbúgvin, sum partrolar saman við Vesturbúgvanum.

Tavan hevur eisini keypt nakrar lastir hjá Vesturbúgvanum.

Skipini hava fingið 3,25 krónur fyri kilo í ár, og prísurin hevur verið hin sami alla vertíðina.

Hini tvey skipini, sum



*Í vertíðini í ár hevur Tavan goldið 3,25 krónur fyri kilo av gulllaksi. Tað eru serliga Polarhav, Stjørnan og Eysturbúgvin, sum hava landað til virkið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*